## Suðuroyingar fáa farstøð

**Landsstýrið ætlar at gera farstøð á nýggju samferðsluavnini í Trongisvági**

FARSTØÐ

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

**Suðuroy:** Tað er nú greitt, at landsstýrið ætlar at gera farstøð á nýggju samferðsluhavnini í Trongisvági.

Nú nýggjur Smyril er í gerð, hevur landið gjørt nýggja samferðsluhavn í Trongisvági.

Men í tí sambandi, hevur stór misnøgd verið um, at ongin farstøð verður gjørd á havnarlagnum.

Vanliga hugsanin er, at tað er ikki at bjóða fólki at gera nýggja samferðsluhavn, uttan at gera farstøð samstundis. Ístaðin skulu fólk sleppast upp á fjall á samferðsluhavnini og noyðast at ganga úti í øllum veðri.

Men á fíggjarlógini næsta ár hevur landsstýrið sett tríggjar milliónir av til nýggja farstøð í Suðuroy.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sigur, at í sambandi við arbeiðið at fyrireika Hovstunnil, leyp nakað av peningi av.

Hann fer nú at søkja Løgtingið um loyvi til at brúka tað avlopið til farstøð á nýggju samferðsluhavini.

Men tað er ikki nóg mikið og tí biðjur hann eisini um tríggjar milliónir afturat á fíggjarlógini fyri næsta ár til farstøðina.

Men umsóknin á fíggjarlógini næsta ár er sostatt treytað av, at løgtingið gevur honum heimild til at flyta avlopið frá Hovstunlinum í ár, til farstøðina.

# Halda høvdið undan vatnskorpuni á Tvøroyri

**Fíggjarligu útlitini á Tvøroyri eru ikki so galin. Skattaprosentið fer at standa í stað næsta ár, men barnafrádrátturin hækkar**

FÍGGJARLIG ÚTLIT

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



**Tvøroyri:** Fíggjarligu útlitini á Tvøroyri eru ikki so galin.

Tað fingu tey at vita, sum høvdu leitað sær á býráðsfund á Tvøroyri í farnu viku.

Á byráðsfundinum var fíggjarætlanin fyri komandi ár til viðgerðar og tá upplýsti borgarstjórin, at útlitini vóru ikki so døpur.

Hann segði, at metingarnar hjá Toll og Skatt vísa, at inntøkan hjá Tvøroyrar kommunu av kommuskatti fer at kvinka eitt sindur uppeftir komandi ár.

Í ár verður mett at tvørafólk fara at hava tilsamans 231 milliónir í inntøku, men næsta ár metir Toll og Skatt, at inntøkan hjá tvørafólki fer a verða góðar 232 milliónir, ella eina góða millión hægri.

Sostatt hevur býráðið lagt eina fíggjarætlan fyri næsta ár, sum javnvigar við 43,5 milliónum, sum er tað, sum kommunan væntar at fáa inn í kommunuskatti komandi ár.

Býráðið heldur ikki, at tað er neyðugt at hækka kommunuskattin og hann verður sostatt aftur 22,5 % næsta ár, akkurát, sum í ár. Hinvegin ætlar býráðið at stuðla húskum við børnum við at hækka barnafrádráttin. Í ár er barnafrádrátturin 4000 krónur um árið fyri hvørt barni, men næsta er er ætlanin at hann skal vera 4500 krónur fyri hvørt barni.

Sostatt hevur hetta býráðið miðvíst og stigvíst hækkað barnafrádráttin øll árini, tí tá ið hetta valskeiðið byrjaði, var frádrátturin 2750 krónur um árið fyri hvørt barni.

Samstundis verður mett, at við árslok 2005, er skuldin hjá kommununi komin niður á 70-80 milliónir, sum eru slakar tvær álíkningar.

Annars hevur kommunan sett eina millión av á fíggjarætlanini fyri næsta ár til at vetrarfriða Tvøroyri fyri seyð.

Kristin Michelsen, borgarstjóri, sigur, at samráðingar eru við hagarnar um endurgjald fyri mist vetrarbit, men at tær eru ikki lidnar enn.

Somuleiðis ætlar býráðið at gera ein bátahyl eystanfyri nýggju samferðsluhavnina og at fáa stuttleikabátarnar yvir hagar at liggja.

Fíggjarætlanin hjá Tvøroyrar Býráð er nú til viðgerðar í teimum ymsu býráðsnevndunum og hon skal hava eina viðgerð afturat, áðrenn hon er endaliga samtykt.

# Bilar og hoppiborg á Tvøroyri

**Hetta vikuskiftið skipað gamlaársnevndin og Lions Klubburin í Suðuroy fyri stórum tiltaki í ítróttarhøllini í Trongisvági**

TILTAK

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Ringreið er eitt, sum børnini kunnu royna í ítróttarhøllini í Trongisvági hetta vikuskiftið. Klokkan 15.30 leygardagin fara Eyðun Nolsøe og brøðurnir Tróndur og Brandur Enni, at syngja og spæla*

**Suðuroy:** Ert tú suðuroyingur og gongur tú við tonkum um at skifta bilin út? So verður møguleikin hetta vikuskiftið. Tí hetta vikuskiftið verður tað ikki neyðugt hjá tær at fara til bilasølurnar, tí nú koma bilasølurnar til tín.

Og tað er lagamanni at hava børnini við, tí meðan tey gomlu hyggja eftir bili, ber til at lata tey smáu royna seg í hoppiborg ella onkrum øðrum.

Hetta vikuskiftið skipað Gamlaársnevndin á Tvøroyri og Lions Klubburin í Suðuroy fyri stórum tiltaki í ítróttarhøllini á Tvøroyri.

Gamlaársnevndin hevur bilaframsýning við fleiri kendum bilamerkjum. Við á sølustevnuni eru fimm bilasølur: Nordbil, Nordcar, Berg Motors,Wenzel Petersen og Reyni Service.

Harafturat eru bæði Tryggingarfelagið Føroyar og lýsingavirki, Lýsing, við á stevnuni at vísa, havt tey hava at bjóða.

Samstundis hevur Lions Klubburin í Suðuroy ymisk tiltøk á skránni. Hjá Lions ber til at royna hoppiborg og ringreið, umframt at ísur og poppkorn verður at fáa. Samstundis verða ymisk sløg av tombola.

Og klokkan 15.30 leygardagin, fara Eyðun Nolsøe og brøðurninr Tróndur og Brandur Enni, at syngja og spæla.

Peningurin, sum gamlaársnevndin fær inn, verður brúktur til nýggjarshaldið á Tvøroyri, sum nú er blivið til eitt hitt stórfingnasta í øllum landinum.

Peningurin, sum Lions fær inn við sínum tiltøkum, verður óskerdur brúktur til vælgerðandi og mentanarlig endamál.

Tiltakið í ítróttarhøllini er opið fríggjakvøldið frá klokkan 19-22, leygardagin frá klokkan 14-20 og sunnudagin frá klokkan 14-20.



# Lærarin verður leiðari á frítíðarskúlanum

**Hóast stóra ónøgd frá Føroya Pedagogfelag, hevur landsstýrismaðurin, Hans Pauli Strøm, ongar ætlanir um at broyta avgerðina um at seta ein lærara í starv sum fyribilsleiðara á frítíðarskúlanum í Trongisvági**

PEDAGOGAR ÓNØGDIR

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*– Pedagogfelagið greiddi frá sínum sjónarmiðum, eins og vit greiddu frá okkara, men partarnir eru ikki komnir til nakra semju. Vit hava tikið avgerðina, og nú vendist ikki aftur, sigur Hans Pauli Strøm.*

*Savnsmynd*

Føroya Pedagogfelag og landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, vóru á fundi týsmorgunin í samband við setanina av einum lærara sum fyribilsleiðarar á frítíðarskúlanum í Trongisvági.

– Vit eru framvegis ikki komin ásamt um nakra semju í málinum, men tað var kanska heldur ikki væntandi, sigur Hans Pauli Strøm

Føroya Pedagogfelag hevur fleiri ferðir hartað landsstýrismannin fyri sín leiklut í málinum um leiðaran á frítíðarskúlanum, og á fundinum við landsstýrismannin týsmorgunin bar fakfelagið enn einaferð sín ónøgd fram.

Pedagogfelagið er bæði ónøgt við mannagongdina í málinum, og avgerðina hjá landsstýrismanninum um, at seta ein lærara sum fyribilsleiðara á frítíðarskúlanum, hóast tað greitt stendur í dagstovnalógin, at ein námsfrøðingur skal standa á odda fyri frítíðarskúlum

– Pedagogfelagið greiddi frá sínum sjónarmiðum, eins og vit greiddu frá okkara, men partarnir eru ikki komnir til nakra semju. Vit hava tikið avgerðina, og nú vendist ikki aftur, sigur Hans Pauli Strøm.

Tað ber sostatt til at staðfesta, at landsstýrismaðurin heldur fast um, at avgerðin hjá Tvøroyar kommunu um at seta læraran heldur enn námsfrøðingin í starv sum fyribilsleiðara av frítíðarskúlanum var hin rætta.

### Kjakast um økið

Á fundinum týsmorgunin greiddi Hans Pauli Strøm umboðunum hjá Føroya Pedagogfelag frá, at politiskur vilji er í samgongunum um at endurskoða dagstovnalógina.

– Eg boðaði teimum frá, at vit ynskja at taka alt økið upp til viðgerðar. Ætlanin er, at vit á ráðnum, Pedagogfelagið og kommunurnar skulu hava neyvt samskifti, og taka málið ígjøgnum. Endamálið við endurskoðanini er at fáa fastar og greiðar mannagongdir á økinum, sigur landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum.

Millum málini, sum skulu viðgerast er grein 5 í dagstovnalógini, sum umfatar børn við serligum tørvi og grein 8, sum er ásetingin um krøvini til leiðarar á frítíðarskúlum.

### Í bíðistøðu

Formaðurin í Føroya Pedagogfelag ynskir ikki at gera stórvegis viðmerkingar til fundin í morgun. Jarvin Feilberg Hansen sigur, at í løtuni viðger Føroya Pedagogfelagið málið, og felagið hevur í løtuni ikki nakra viðmerking til niðurstøðuna á fundinum.

– Vit bíða í løtuni eftir nøkrum skjølum frá Tvøroyrar býráð, og áðrenn tey eru komin okkum um hendið, hava eg onga viðmerking, sigur Jarvin Feilberg Hansen.

# Stuðulskonsert og innsavning

TÍÐINDASKRIV



Komandi leygarkvøld, 9. okt., kl 20, verður stuðulskonsert í Læraraskúlahøllini á Frælsinum, har kend nøvn sum Anna D. Háberg, Gunnar Mikkelsen og Havnarkórið fara at syngja.

Tað eru vinafeløgini Føroyar-Ísrael sum skipa fyri innsavningini, sum er til frama fyri neyðstødd og fátæk í Ísrael.

Sum øll vita, so hava áhaldandi yvirgangsatsóknir nú í fýra ár verið til miklan skaða í Ísrael, og mong eru deyð. Hagtølini siga, at eini 600 tilvildarlig fólk eru álvarsliga skadd og fleiri hava fingið varandi mein.

Innsavningin er til frama fyri:

- barnafamiljur ið hava mist uppihaldara
- fátæk á gøtunum

### Hví Ísrael?

Vit vita fullvæl, at neyðin er stór nógvastaðni í heiminum, og ynskja ikki at taka nakað frá nøkrum, men hví vilja vit hjálpa júst Ísrael? Jú, vit halda at vit standa í skuld til teirra. Paulus sigur um tey, ið savnaðu inn til tey fátæku í Judea, at tá ið tey hava fingið part í andaligu góðum teirra, skylda tey teimum eisini at tæna teimum við hinum tímiliga. Jødunum varð orð Guds litið upp í hendur, og teir hava varðveitt tað, og frá jødunum er Kristus komin. Hervið er ikki sagt, at hjálpin, ið kemur úr Føroyum, skal avmarkast til jødar. Vit vilja ikki gera mannamun.

Vit heita inniliga á landsmenn okkara um at taka væl undir við hesi innsavning. Allur stuðul munar tí „mangir løkir smáir gera stórar áir".

Takk fyri tína hjálp!

**Ísraelsfelagið**
**Vinir Ísraels í Føroyum**
**Svenning av Lofti**
**Dánjal Poulsen**

## Tjóðveldisflokkurin kúrrur

Tað er lítið nýtt at frætta úr Tjóðveldisflokkinum um ósemjuna, ið er íkomin millum Tórbjørn Jacobsen og Høgna Hoydal. Hvørki aðalstjórn ella formaður Tjóðveldisfloksins vilja siga nakað í málinum.

Høgni Hoydal er í løtuni staddur í Danmark í Fólkatingsørindum, og hann sigur seg ikki hava nakra viðmerking um málið í løtuni. Formaðurin í aðalstjórn Tjóðveldisfloksins, Jóannis Dalsgarð, ynskir somuleiðis ikki at úttala seg um málið

**-páll**